# Bixin satsar upp á lekkur barnaklæði

**Nýggjasti handilin í høvuðsstaðnum, Bixin, hevur barnaklæði av fronsku merkjunum IKKS og Jean Bourget, og seinni kemur eisini eitt gott hollendskt merki aftrat**

Tá tosað verður um klæði, snýr tað seg eisini ofta um stíl. Og stílurin kann vera næstan líka ymiskur, sum tey eru, ið ganga í teimum ymsu klæðunum.

Leygarmorgunin kemur enn eitt tilboð um nýggjan og øðrvísi stíl í føroyska klædnaheiminum, tí tá letur upp ein nýggjur handil mitt í gongugøtuni í Havn, sum eitur Bixin.

Handilin, sum liggur í Niels Finsensgøtu 7, millum handlarnar Stásið og H.C.W. Tórgarð á Káta horninum, marknaðarførir seg sum ein handil, ið selur »lekkur barnaklæði«.

– Eg havi í fleiri ár hugsað um, at tað kundi verið stuttligt at selt nøkur barnaklæði, sum eru eitt sindur øðrvísi enn tað, tú frammanundan kanst keypa í øðrum handlum, sigur Marita Christiansen, ið hevur skift skrivstovustarvið á Toll- og Skattstovuni út við sín egna handil við barnaklæðum.



*Her sæst eitt lítið úrval av klæðum frá IKKS. Bixin ger tó vart við, at ikki øll klæðini á myndini eru at finna á hillunum júst nú*

– Um Bixin kann geva fólki størri úrval, tá tey skulu finna klæði til børnini og tey heilt ungu, so er tað gott. Eg havi so roynt at funnið klæði, ið kunnu breiðka samlaða úrvalið.

## Sterk og góð klæði

Í fyrsta umfari leggur Bixin serliga dent á tvey fronsk merki, IKKS og Jean Bourget, men seinni kemur eisini eitt gott hollendskt merki aftrat. Vanliga verða onkur onnur merki eisini at finna í nýggja handlinum.

Bæði IKKS og Jean Bourget eru annars tvey »typisk« fronsk merki. Tað vil siga, at stórur dentur er lagdur á detaljur og smálutir, ið gera hvørt plaggið til nakað øðrvísi og serligt.

– Hóast hetta, so eru talan ikki um dýr klæði. Tey eru heldur ikki millum tey allarbíligastu, men liggja onkrastaðni í miðjuni, sigur Marita, sum ikki útihýsir, at hon sum frálíður fer at fáa sær onnur merki eisini.

– Børn eru í gongd alla tíðina og hugsa ikki so nógv um, hvørjum tey eru í. Tí krevst av slíkum klæðum, at tey tola eitt sindur av hvørjum. Hesum havi eg eisini tikið hædd fyri, tí eg vil hava klæðini at vera bæði dygdargóð og slitsterk.

Umframt at fólk sjálvandi kunnu støkka inn á gólvið í Bixini, so ber eisini til at fáa eitt sindur at vita á heimasíðuni, www.bixin.fo

Har fer eitt nú at bera til at tekna seg fyri tíðindabrævi, ið av og á fer at fortelja um tilboð, nýggja vøru og annað.

Bixin hevur telefon 32 28 28 og upplatingartíðirnar eru tær vanligu í miðbýnum í Havn: Mánadag til mikudag frá klokkan 10 til 17.30, hósdag og fríggjadag frá klokkan 10 til 18 og leygardag frá klokkan 10 til 14.


www.smyril-line.fo

**Manning til NORRÖNU**

**Í sambandi við at Norröna byrjar at sigla nýggja farleið 10. januar 2004, verður við hesum søkt eftir manning.**

Talan er um øll størv innan catering:

- móttøkufólk
- tænarar
- reingerðarfólk
- fólk í kafeteria
- barrfólk
- kokkar
- bakarar
- goymslufólk







Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum, altjóða tænastustigi. Tað er eitt krav, at umsøkjararnir duga væl enskt, hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst** (ikki eldri enn 2 ár).

Smyril Line bjóðar størv í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

Fleiri upplýsingar fáast frá Andrias Joensen, manningarleiðara, á tlf. **34 59 00** ella **34 59 78**.

Umsóknir og CV skulu sendast til:

**Smyril Line**
**Jónas Broncksgøta 37**
**Postboks 370**
**FO-110 Tórshavn**

Ella við telduposti til:

**technical@smyril-line.fo**

SMYRIL LINE

J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo


# Fransiskanarasystrar

TÍÐINDASKRIV
*frá Katólsku kirkjuni*

Hava tit onkuntíð undrast á, hvørjar fransiskanarasystrarnar eru og hví tær eru her?

Mánadagin 24. nov. kl. 19.30 í Mariukirkjuni fer systir Maria at siga frá um systrarnar og ta kvinnuna, Héléne de Chapottin, sum var stovnari teirra og sum varð sælugjørd síðsta í Róm. Aftan á verður videofilmur (á enskum) vístur.



6. januar 1877 byrjaði eitt nýtt framtak: stovnanin av nýggjari skipan í Kirkjuni. Héléne de Chapottin, kend um allan heim undir sínum kleysturnavni, Mary of the Passion, var fødd í Nantes í Bretagne í Fraklandi í 1839. Hon var ein sterk kvinna, livandi og glað, ein kvinna, ið ikki óttaðist vandar ella tvørleikar, og sum var slóðbrótari fyri eini nýggjari leið í Kirkjuni, ikki bara fyri seg sjálva, men fyri fleiri túsund aðrar kvinnur, sum av sínum persónliga kalli fylgja somu leið: Franciskanarasystrarnar.

Ung komu skjótt úr øllum heiminum at liva og taka lut í hennara missiónsfyrimynd: at boða Kristi Lív til ein líðandi heim og gera alt, ið tørvur var á, og at fara har eingin annar kundi fara. Heimurin var teirra heim. Hóast teir tvørleikar, sum fyglja við eini nýggjari byrjan, mentist tiltakið og hevði framgongd.

Tá ið Mary of the Passion doyði 15. nov. 1904, vóru 2.069 systrar, sum arbeiddu á ymiskum virkisøkjum í 24 londum. Í 1932 komu Franciskanarasystrarnar til Føroya. Í løtuni eru umleið 7.712 Franciskanarasystrar í 76 londum og frá meira enn 70 tjóðskapum. 7 systrar eru í Føroyum av Malta, úr Írlandi, Belgiu og Corée.

Mary of the Passion hevur verið og er framvegis ein fyrimynd og ein kelda til íblástur fyri systrar sínar.

Øll eru vælkomin.






# Norðurlendsk ráðstevna um skeljar og skeljadjór

TÍÐINDASKRIV

Fyri 3. ferð verður skipað fyri ráðstevnu av um skeljar og skeljadjór. Tann fyrsta ráðstevnan var í Strømstad í Svøríki 2001, og næsta ráðstevnan var í Bergen 2002. Tá var samtykt, at næsta ráðstevnan skuldi verða í Føroyum.

Fríggjadagin 21. november verður hildið til í Müllers Pakkhús í Tórshavn.

Leygardagin 22. november verður hildið til í Norðurlandahúsinum

Leygarkvøldið verdur døgurði í Müllers Pakkhús við øllum góðum úr sjónum (Birgir Enni, saman við manning av Norðlýsinum, skipa fyri)

Sunnudagin verður aftur hildið til í Müllers Pakkhús.

Ráðstevnan kemur at snúgva seg um skelja- og skeljadjóra vinnuna í Norðurlondum.

Umboð úr Føroyum koma at greiða frá um havbotnin og havstreymum kring oyggjarnar; og um planteplankton og hvønn týdning tað hevur fyri aling av kræklingi. Eisini verður greitt frá um øður og krabbaframleiðslu, skeljavirki, og sølu av skeljum og skeljadjórum.

Umboð úr Danmark greiða frá um Dansk Skaldyrs Center, og um menning av kræklingi og ostra (østers).

Íslendingar fara at greiða frá um teirra kræklinga framleiðslu.

Norðmenn fara saman við svium, at tosa um krabbar og felags norðurlendskt samstarv um sølu.

Tað eru Birgir Enni frá Norðlýsinum og Árni Nicolajsen frá Fiskirannsóknarstovuni, sum skipa fyri.


Select

**Leiðari til Shell-støðina í Gøtudali!**

Søkt verður eftir støðleiðara til Shell-støðina í Gøtudali, at byrja skjótast tilber.

***Starvið:***
Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi starv, sum dagligur leiðari á Shell-støðini. Støðin er ein sonevnd **Select-støð**. Hetta eru sera nýmótans støðir, ið leggja dent á at veita kundunum bestu tænastu og eitt serliga stórt vøruúrval, m.a. nýbakað breyð, pylsur, tips & lotto umframt allar bilvørur, sjálvandi.

***Eginleikar:***
Vit ímynda okkum at umsøkjarin

- hevur góð leiðsluevni
- er ein góður seljari
- er íðin og ágrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er miðvísur og framsøkin
- er fjølbroyttur og smidligur
- hevur ordanssans
- er dugnaligur í samstarvi við viðskiftafólk og starvsfelagar

***Løn:***
Vit bjóða eina løn við eftirlønarskipan, ið verður ásett í samsvari við útbúgving og royndir.

***Umsóknir:***
Áhugað kunnu senda umsókn við neyðugum skjølum og merkt "Støðleiðari" til P/F Føroya Shell, Viðarnes, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 28. november 2003. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara á telefon 347400.

Team 85 • 358000

www.shell.fo



**Sosialurin** hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo

teldupostur: post@sosialurin.fo



**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 22.11. kl. $18^{30}$
Leygardagin 22.11. kl. $21^{15}$
Sunnudagin 23.11. kl. $19^{30}$
Sunnudagin 23.11. kl. $22^{15}$




Leygardagin 22.11. kl. $20^{45}$
Leygardagin 22.11. kl. $24^{00}$
Sunnudagin 23.11. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 23.11. kl. $23^{00}$




**Billettprísur 45,- kr.**
Leygardagin 22.11. kl. $16^{15}$
Sunnudagin 23.11. kl. $17^{15}$




Leygardagin 22.11. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 23.11. kl. $18^{00}$




Leygardagin 22.11. kl. $23^{00}$
*– Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**



**Frumsýning**
**Hósdagin 27.11.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**